TING-HELLAN



*Frá stóru mótmælis-gongunum*
*Mynd: Reuters*

at andsstøðan hevur verið sera dugnalig at leggja til rættis mótmælini. Fólk, sum kenna Ukreina væl, meta at valsvikið var dropin sum fekk bikari at flóta yvir, og at einki ynski var um at halda áfram við kósini hjá stjórnini. Talan er heldur um eitt frával av sitandi stjórn og forseta, og frávæl frá at halda fram í einari russiskari skipan, heldur enn at talan er um at Ukreina kastar seg í føvningin á ES. Broytingin og mótmælini eru tí ikki ein topstýrd elituætlan, men heldur ein fólksins vilji, sum saman á gøtuni hava brúkt felags valdið sum borgarar í landinum, til at fara úr russiska lógvanum til at vera eitt sentralevropeiskt land.

Tað tó ein fragd at síggja, at Ukreinar, hóast óvandir við demokrati, í eini harðari stríðstøðu megna at gera eina tjóðskaparliga semju, soleiðis at andstøðan fær sítt ynski um umval, meðan sitandi forsetin fær sítt ynski um at avmarka valdið í forsetaembætinum. Hetta má sigast at verða ein tjóðskaparlig semja millum stríðspartarnar, sum bjargar Ukreina frá eini stríði, sum í ringasta føri skilti landið sundur í tveir partar..

## Sjálvsavgerðarrætturin

Søgan, støðan og ukreinski veruleikin er eitt dømi um, hví sjálvsavgerðarrætturin er so ringur at fáast við í altjóða høpi. Við føroyskum eygum er hetta fyribrygdi ikki so torskilt, vit hava eitt fólk, egið mál, mentan, avmarkað landaøki og eru ein eind, umframt at vit eru fjarskotin frá miðveldinum. Fingu Føroyar fullveldi, verður talan ikki um eitt samanhangandi land sum fer í tvíningar, men ein partur av ríkinum, sum tekur seg burturúr. Soleiðis er ikki við Ukreina. Landamørkini eru ofta vorðin flutt, landið hevur søguliga hoyrt til ymisk lond, umframt at tey eru fleiri fólkasløg. Har afturat er Krimhálvoyggin, sum hevur ein serstatus og longu hevur royndt at tikið loysing frá Ukreina.

Fer Eysturukreina at krevja serstøðu, vilja krimbúgvar hava meira, og kanska onkur annar minniluta bólkur eisini vil. Alt Eysturevropa er fult av samansettum londum, tí er bara orðið sjálvsavgerðarrættur eitt ræðuorð, tí størru londini síggja fyri sær, at so verða øll lond við fleiri fólkasløgum pettað sundur. Tó tykist tað, sum tað bert var politiska elitan í Eysturukreina, sum er sett av forsetanum, ið ynskir serstøðu. Talan tykiskt ikki at vera eitt breitt ynski millum vanliga fólki í Eysturukreina.

Hóttanin frá politikkarum í Eysturukreina um sjálvstýri, er nóg mikið at fáa óttan fram hjá nógvum av heimsins londum, serliga teim um hava fleiri fólkabólkar innan fyri sínar landoddar. Fyri teim verður hetta brúkt sum eitt dømi, um at sjálvsavgerðarrætturin ikki skal verða ov liberalur, tí so fáa vit alt ov nógv lond og stríð. Tað er hesin hugsunarhátturin um sjálvsavgerðarrætt, sum hevur gjørt tað so trupult hjá Føroyum, at fáa viðhald frá ST ella øðrum londum til at staðfesta Føroyum henda rætt. Hetta sjávt um okkara støða er ein heilt onnur. Havi sjálvur verið partur av einum kjakfundi um hetta evnið, har danski politikkarin Svend Auken segði, at sjálvandi kundi Danmark ikki bara staðfesta Føroyum sjálvsavgerðarrætt, tí hvat høvdu baskararnir so ikki gjørt? Tí krevst ein nýhugsan um sjálvsavgerðarrætt, har m.a. atlit verða tikin til fjarskotin oyggjarsamfeløg, sum okkara, so okkara rættur ikki skal tengjast at m.a. tílíkum valdsstríði, sum vit í dag síggja í Ukreina.

Munurin millum eystur og vestur í Ukreina er stórur. Men metingin er ikki, at landið fer í tvíningar av verðandi orrustuni. Talan er heldur um at fólkið vil flyta seg úr russiska skugganum og inn í eina bjartari miðevropiska framtíð. Verður talan um nakað stríð um loysing, er tað heldur Krim, sum sær sær hendan møguleikan nú, meðan politiska skipanin hevur hesa hørðu orrustuna, og gera sær dælt av tí.